

*-Tað er onki minni enn stór skomm, at okkara evsti mentanarligi mynduleiki gongur á odda fyri at køva alt skilagott kjak um list og mentan, sigur Arnbjørn Ó. Dalsgarð, bókavørður og ummælari*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

uppgávan hjá teimum, sum skulu varða av okkara hægstu andligu virðum, at doyva fólk við einum útholaðum listahugtakiði, so tey til endan ikki síggja mun á dygd og lættisoppi.

– Man kann ikki siga fólk ring fyri at halda, at alt er list, um ongin fortelur teimum nakað annað. Um mentamálaráðið ikki sær tað sum sína uppgávu at skyna ímillum, og vanlig fólk ikki tora, hvør skal so siga fólki, at tað finst list, sum fer út um tað gerandisliga og ger okkum ríkari ? Og hvussu kanst tú vænta, at fólk yvirhøvur spyrja eftir góðari list, tá politiski myndugleikin ferð eftir ferð skúgvar sjónarmiðini hjá seriøsum listafólkum til viks, spyr Arnbjørn.

## Politiska leiðslan

Arnbjørn ætlar ikki at bera í bøtuflaka fyri hvørki discountloysnunum ella framferðini hjá sitandi mentamálaráðharra. Hinvegin eiga vit at hava í huga, at ráðið, hann er settur at varða av, sjáldan hevur havt tær sømdir og ta virðing, tað hevur uppiborið. Sum dømi nevnir Arnbjørn, at tað seinastu 17 árini hava sitið ikki færri enn 21 mentamálaráðharrar.

– Eg giti, at ongin av øllum hesum ráðharrunum hevur fingið ta játtan, hann hevði brúk fyri, fyri at føra ein skilagóðan mentanarpolitikk, so tað er kanska ikki so løgið, at støðan er, sum hon er.

Tað er uttan iva eisini trupult at halda fast í hugsjónunum, tá tú áhaldandi ert kroystur fíggjarliga og skalt venda hvørjum oyra, sigur Arnbjørn.

Ymiskt hevur tó ligið á borðinum í mentamálaráðnum. Til dømis eru ikki færri enn trý rúgvusmikil mentanarálit gjørd seinastu 10 árini. Okkurt av hesum er eisini vorðið veruleiki, eitt nú Tjóðpallurin, Mentanargrunnurin og Granskingarráðið, men onki av hesum hevur fingið ein brotpart av tí játtan, sum fakfólk hava mett vera neyðuga.- Vit vita, at tað eru pengar í okkara samfelag. Tað síggja vit allatíðina við til dømis tunnilsbyggingum, skattalætta, keypi av ferjum o.s.fr. Tí slepst ikki undan, at raðfestingin onkusvegna endurspeglar tey virði, sitandi politiska leiðsla metir hægst. Her tykist tað, sum tað er sjálv tann politiska skipanin, sum fullkomiliga vanvirðir ta uppgávu, sum eitt mentamálaráð skal røkja. Men tað ger ikki trupulleikan við verandi mentamálaráð minni álvarsaman og átreingjandi. Heldur tvørturímóti, sigur Arnbjørn Ó. Dalsgarð.